MÁLTEIGURIN

Tað vrakaða málið

Tað eru tvær høvuðsáskoðanir at finna í orðaskiftinum um málið: reinsiáskoðanin og brúksáskoðanin.

Síðan stríðið fyri málsins rættindum tók seg upp, hevur ein partur av føroyingum hildið, við orðunum hjá J. C. Svabo (1782), at føroyskt var »fordervet«, t.e. tað var komið for nógv »danskt« uppí. Tí mátti málið *reinsast.*

Hini, tey við brúksáskoðanini, halda, at føroyskt hevur hildið sær merkiliga »rent og ublandet som paa Sigmund Brestissøns Dage« (Napoleon Nolsøe, 1846). Donsk og onnur orð, sum eru komin inn, eru komin upp á ein náttúrligan máta, *og tey vika ikki málsins sterkastu súlur: bending, úttalu og fastar máliskur (idiom).*

Vit kunnu eisini brúka orðini 'pyntiføroyskt' og 'arbeiðsføroyskt' um hesi bæði málini. Pyntiføroyskt er eyðkent av nógvum nýggjum og ókendum orðum, sum gera tað torført at brúka. Tað kemur fyri, at næmingar bøna um at sleppa at skriva krevjandi uppgávur á donskum – og fáa nei frá skúlamyndugleikunum.

Tey við brúksáskoðanini halda, at málið ikki skal vera ein sýnislutur sum ein tufla á Forngripagoymsluni. Føroyskt er eitt a-m-b-o-ð, sum vit hava brúk fyri í gerandisdegnum. Og sleppa vit ikki at brúka føroyskt, so er vandi fyri, at vit fara at brúka okkurt annað málamboð. Øll duga danskt, og tey flestu duga eingilskt. Kanska kann ein møgulig oljuframtíð gerast ein vandi.

Tað liggur ein grundtanki av misáliti og formyndarí undir málreinsingini. Hvat verður vunnið við at reinsa og skrubba málið – og síðani pynta tað við íslendskum lánum og heimagjørdum orðagátum? Summi ting skulu slett ikki skrubbast og pyntast. Rasmus Effersøe skal sleppa at hava sína patinu í friði, har hann stendur og heldur eitt kritiskt eyga við Gamla Apoteki. Føroyskt verður ikki betri av, at onkur sigur 'tengja' í staðin fyri 'knýta', 'kervi' í staðin fyri 'system' ella 'eitthvørt' í staðin fyri 'okkurt'. Upp á hvønn máta er 'veglummi' betri enn 'vendiplass'? Hví skulu kenniorðini útruddast? Hví skulu hvørsfallsliðini vendast øvugt: Skal 'Harrans ólukka' nú eita 'vanlukka Harrans'?

Tá ið sjónvarpið snakkar um tað, sum er »handan lúkurnar«, so vita almindiligir føroyingar, at'kusturin stendur *aftan fyri* hurðina'; men *'handan fjøllini bláu er Soria Moria Slott'.* Í dag er tað so ómakaleyst at blanda stíl, tí tað kunstiga málið hevur innbygdan stílmiksara.

Tá ið útvarpsmenn brúka víkingaføroyskt og siga 'skamt' í staðin fyri 'stutt«, so er tað synd í útvarpinum, men tað er eisini eitt signal um, at gerandisføroyskt ikki verður hildið at vera nóg *fínt.*

Hvør hevur makt ella vísdóm til at siga, hvat er fínt ella ófínt? Hví er 'atstøðingur' fínari enn 'assistentur'? Kanska er tað øvugt? 'Professari' er jú fínari enn 'fróðskaparseturskennari'. Og hví er 'løgreglumaður' fínari enn 'politistur', tá ið 'advokatur' er fínari enn 'sakførari'?

»Men hvussu kunnu tær báðar máláskoðanirnar sameinast?«, spyr kanska onkur. Hetta gerst best við, at tað kemur at standa í tí nýggju fólkaskúlalógini, at lærarin má fylgja millumlanda samtyktum og ikki gera mismun vegna kyn, trúgv, húðarlit ella móðurmál. Í móðurmálsmálundirvísingini má hann ikki royna at fáa børnini at vraka tað, sum mamman hevur lært tey.

Næsta ár verða 50 ár liðin, síðan Heimastýrislógin ásetti, at føroyskt er høvuðsmálið í Føroyum, og 60 ár verða liðin, síðan danskir skúlamyndugleikar góðkendu føroyskt. Er tað ikki upp á tíðina, at vit sjálvi góðtaka okkara mál?

C.

HÖRMANN
GARAGU-HURÐAR!
✓ Dygd fyri hvørja krónu
✓ Sterkar og álítandi
Stutt sagt – illa ber til at velja aðra hurð enn HÖRMANN
MALLCO Klaksvík Tlf. 57977 - 84738

114	HILLIÓN BÝUR	JOHN	REGIN L. UNESEN	SUB-URB	ITALIA	EING. BÝUR	KALIUM	ST.	KONA	UNIVERSITET-BÝUR	NORGE	LAND	KIRKJU-BÝUR	EU	FÁI MAÍR	KOLA-MINU-BÝUR
HARKNA BÝUR			1													
GRØNL. HÚS					HULL		"NEI" HELDUR TIL		2		GRUN-AÐU TONS					
BRÓÐIR FÍÐEL					EU "HØGTI"			KVOLD BLÁB-PYLSA						Ljós		
MÁL STYTTING			KENDI METUR						NULL		HJALJÓÐ HAVNA BÝUR		3	FJØLL Í USA	HIETSHALS FRONSK Á	4
ROMAR-TAL		SIÐ-MENNING FRÁ					5		TÍBINDA-STOVA			LENDI				
Í LØTUNI			RØNIVE ATSØKN		Ð AE				ÚTVARP SERBARI		6	HOLL ØSTUR		7		
ELDUR										ITALIA		"HARRI"				KØBEN-HAVN
HYRÐ-GEN		TÓNI TONS	8		VIÐUR					SNØRKI ÓVANLIG		SKUMPA				
BITIL					ÍRAN	9		DATIV (STYTT.) LÍVA				SKEIÐ				
METUR		Á BRÁÐAN BÚGVI			SPANIA		FÓLKA-SLAG KONA				10	ROLAND N. NIELSEN NATRIM				BIVA
	SPANIA		TONS — S. CHI MIKH		EING. BÝUR POLA — I			11					SÁTA TÓNI			
	BÝUR Í WALES BOB — ?		12						METUR ROKNAÐ		FRAM-LEIÐA PLÁTA				KALIUM TVASS	
MAÐUR					13	ALCA TELDU-MÁL		NUMMAR SPRIÐUR		14		UK. EIND SLEÍÐIN				
OXY-GEN		ROMAR-TAL	VEST-MANNA-SKIP	GEORGIA EGO			— I BONCHE OKKUM	15					CARBON RØKJA-VIK			
HAVNA-BÝUR											SKEIÐ BETA			KLO-JOLT SVÁVUL		
YES, DARLING									16	TALU-FEILUR						

©Bos, 1997

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: HILDARLEIKUR

H	A	M	M	E	R	S	H	A	I	M	B		B	O	S
E	M		Ú		E	I	N	S		D	E	B	E	S	
N	O	R	S	K	A	R		K			R	E	V	U	M
T		E			L			H	A	M	A	K	I	T	A
Z	I	S	K	A		S	O	A	P			L	N		T
E	L	T	Ø	R		A		M	O	H	R			D	R
113	L	O	L	L	A	N	D		L	E	I	Ð	A	R	A
K	I	R	I	B	A	T	I			Y			K	Ó	S
Ó		E	R	E	D	E	R	I	K	S	B	E	R	G	
S	I	E		R		R	K		A	T		G	Y		D
	R		B	G			A	W	I		L	I	L	L	Y
W	I	R	E		K	V		A		M	Ü	L	L	E	R
E	A	R	L		R	E	I	N	E	R	T		I	N	G
I	N	R	I			Y	N	G	D		Z	G	T		I
H			Z	N		H			D	R	E	P	U	R	
E	I	S	E	N	B	E	R	G		A	N		R	Ó	S

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi høsdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Vinnari: Laila Arge,
Reynsgøta 81
160 Argir

Loysunarorð: 114

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.